# Dong fekk bingo




*Kortið vísír, hvat Dong hevur fingið lut í loyvunum, sum bretska stjórnin júst hevur latið oljufeløgunum.*

*- Kelda Dong*

**Danska oljufelagið Dong hevur verið skorað kassan í 22. rundu í bretskum øki. Felagið fekk tillutað íalt sjey loyvi og av teimum liggja tey flestu tætt upp at føroyska markinum**



*Brent Cheshire, sum hevur drúgvar royndir í altjóða oljuvinnuni, bæði hjá Shell og Hess, er frá 1. september settur sum stjóri hjá dótturfelag í Bretlandi. Arbeiði hansara verður m.a. at fyrisita ein hóp av loyvum, sum liggja skamt frá føroyska markinum*

*Mynd Dong*

OLJULEITING
*Jan Müller*

Danska oljufelagið DONG, sum er tað útlendska oljufelagið, sum samanlagt er við í flestu loyvum á føroyska landgrunninum, er nú helst eisini tað felagið, sum er við í flestu loyvum hinumegin markið eisini, tvs. á bretska landgrunninum.

Eftir at hava bygt upp royndir og ekspertisu í olju- og gassleiðing og framleiðslu á donskum øki í Norðsjónum hevur Dong seinastu árini eisini hugt longur vestur og norður, og her serstakliga móti Atlantsmótinum. Dong var sostatt eitt av feløgunum, sum fekk tillutað loyvi í fyrstu føroysku útbjóðingini í tí sokallaða Faroes Partnership samtakinum. Seinni er felagið eisini farið uppí samtakið, sum Statoil stendur á odda fyri, og sum hevur bæði 6 og 9 ára loyvi. Herfyri keypti felagið seg so eisini inn í fleiri loyvi á bretska landgrunninum.

……og so hendir hetta! Felagið hevur fingið tillutað ikki færri enn sjey leitingarloyvi í økinum vestan fyri Hetland. Um somu tíð hevur felagið so gjørt av at lata upp skrivstovu í London og hevur sett stjóra, Brent Cheshire, ið hevur royndir í oljuvinnuni hjá stórum feløgum sum Shell og Amerada Hess.

Sum nakað heilt nýtt verður Dong fyristøðufelag í einum av loyvunum. Talan er um eitt loyvi, sum liggur norðan fyri Laggan-gassfeltið, har felagið eisini eigur ein part uppá 20%. Annars liggja fimm av loyv-unum, sum Dong hevur fingið tillutað, tætt upp at føroyska markinum, har felagið longu frammanundan er við í loyvum, báðumegin markið.

Altjóða leitistjórin hjá Dong, Søren Gath Hansen sigur, at økta virksemið og tillutaðu loyvini eru partur av strategiini hjá Dong at vera við í leiting á Atlantsmótinum við tí fyri eyga í framtíðini at kunna fara undir at framleiða olju og gass.

– Vit eru í ferð við at byggja upp eina sterka støðu í økinum vestan fyri Hetland, sum er eitt av teimum mest lovandi økjunum í Norðureuropa, hvat viðvíkur møguleikanum at finna olju og gass. Vit hava nú so mikið av virksemi í økinum, og grundarlag er fyri at stovna dótturfelag í Bretlandi og í tí sambandi hava vit fingið eitt gótt fólk at standa fyri felagnum. Tað skapar so aftur grundarlag fyri at menna forrætning okkara í bretska økinum sigur Søren Gath Hansen.

Í samrøðu við Sosialin sigur Dongstjórin, at loyvini, sum nú eru latin vestan fyri Hetland og har serliga uppat føroyska markinum vísa, at áhugin fyri hesum útjaðaraøkinum aftur er við at vaksa og kann tað hava nógvar spennandi avbjóðingar við sær. Her sipar hann ikki minst til møguleikan at fara undir fyrstu veruliga gassframleiðsluna frá gassfeltum í økinum. Lagganfeltið, sum liggur miðskeiðis millum Hetland og føroyska markið, og sum eftir øllum at døma er eitt stórt gassfund, verður møguliga bygt út í næstum. Avgerð skal takast um hetta næsta hálva árið. Fleiri stór oljufeløg so sum Total, sum eisini er fyristøðufelag fyri Laggan-feltinum, hava eisini fingið fleiri loyvi í 22. Rundu. Her serliga loyvi, sum liggur í tí sokallaða »gassøkinum« norðan og vestan fyri Hetland. Hugsast kann, at uppaftdur nýggj fund í hesum økinum, kunnu gera tað lønandi møguligt, at hevur verður bygt út ein rørleiðingsskipan.

Søren Gath Hansen sigur seg annars vóna, at áhugin fyri brestka økinum, eisini kann koma at ganga komandi leiting á føroyska landgrunninum. Dong verður so í hvussu er eitt av feløgunum, sum fer at meta um alt Atlantsmótið undir einum.



ítróttur
Nr. 177 • fríggjadagur • 17. september 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Andrew í rætta lagnum

**Jón Rói Jacobsen varð kosin besti maður hjá Frem, men fyri fjórðu ferð á rað eydnaðist tað ikki hjá niðurflytarunum at fáa fulla úrtøku**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*



*Andrew av fløtum skeyt tvey mál, tá Fremad Amager mikukvøldið vann 4-1 á AB*

Mikukvøldið var eitt umfar í næstbestu donsku deildini. Fremad Amager var á heimavølli, og hesa ferð spældu teir í Sundby, har umvælingin nú er liðug. Seinastu ferðirnar hava teir verið í Tårnby, tá ið teir hava verið á heimavølli.

Andrew av Fløtum var einsamallur føroyingur á liðnum hjá Fremad Amager. Jann Ingi Petersen og Hjalgrím Elttør vóru heldur ikki á beinkinum.

Einsamalli føroyingurin gjørdi rættuliga um seg, tá ið Fremad Amager vann 4-1 á niðurflytarunum úr AB. Við sigrinum vaskaði Fremad Amager eitt sindur burtur av ússaliga avrikinum á útivølli ímóti Brønshøj.

Fremad Amager legði seg á odda í 18. minutti, og í 33. minutti javnaði AB eftir hornaspark. Mitt í 2. hálvleiki legði Andrew av Fløtum framum aftur. Tað gjørdi hann við langskoti úr 25 metrum. Fýra minuttir undan leikloki økti Fremad Amager, og í síðsta minutti staðfesti Andrew av Fløtum trivaliga heimasigurin.

Í vikuskiftinum skal Fremad Amager spæla í Horsens. Johan Byrial Hansen og liðfelagarnir hjá honum eru í góðari gongd. Mikukvøldið vunnu teir 3-2 í Vejle. Tað er næstan tíggju ár síðani, at Vejle síðst basti grannunum úr Horsens, og heldur ikki hesa ferð eydnaðist tað. Talan var um rættuligt undirhald. Trý av málunum vórðu skorað upp á brotsspark.

Hjá Frem gongur tað ikki væl. Mikukvøldið høvdu teir vitjan av Køge, sum skoraði einsamalla málið miðskeiðis í 2. hálvleiki. Jón Rói Jacobsen var eftir dystarenda kosin sum besti maður hjá Frem. Í fýra teimum seinastu dystunum hevur Frem bara skorað eitt mál. Verjan verður søgd at vera stinnasti parturin av liðnum. Tá ið Frem royndi at koma afturíaftur, varð Jón Rói Jacobsen fluttur fram í álopið. Tað boðar frá, at venjarin hevur funnið út av, hvussu stórar dygdir skjóti maðurin eisini hevur í álopspartinum.



*Lassin Isaksen skal í komandi mánaði døma HM-undankappingardystin millum Bosnia Hersegovina og San Marino*

# Lassin á Balkan at halda skil á

**Einasti altjóða føroyski fótbóltsdómarin skal í næsta mánað døma HM undankappingardyst í Bosnia Hersegovina**

ALTJÓÐA DÓMARI
*Jóannes Hansen*

Tað hava í summar verið boð eftir einasta altjóða føroyska fótbóltsdómaranum, og nú eru aftur boð eftir Lassanum Isaksen. Nú skal hann niður á Balkan at halda skil á. Talan er um HM undankappingardyst millum Bosnia Hersegovina og San Marino. Dysturin í HM undankappingarbólki 7 verður í Sarajevo mikudagin 13. oktober. Saman við dómaranum fara tveir føroyskir hjálpardómarar – Jens Albert Simonsen og Jón Kári Frederiksen. Fjórði dómari verður Michael Svendsen úr Danmark.

Hetta er onnur ferðin, at Lassin Isaksen stendur frammanfyri sovornari avbjóðing. Fyrra ferðin var fyri tveimum árum síðani, tá ið hann dømdi undankappingardyst millum Liktinstein og Ísrael.

Seinasta fjórðings árið hevur Lassin dømt tríggjar altjóða dystir. Tann fyrsti var Intertoto cup dystur í Slovakia, síðani UEFA Cup dystur í Luksemborg, og so dømdi hann U-21 landsdyst millum Estland og Luksemborg. Saman við honum hava verið teir báðir omanfyri nevndu og Tummas Pauli Olsen.

Síðsta sunnudag dømdi Lassin HB og B36, og nú sunnudagin skal hann døma á Toftum, har B68 og ÍF fara at spæla sera týdningarmikla oyggjauppgerð.

– Mær dámar væl at døma, og altóða uppgávur av tí slagnum, sum vit nú skulu døma í Sarajevo, taki eg sum eyka herðaklapp og høvi at gera tað, sum eg seinastu nógvu árini havi brúkt so nógva tíð og orku uppá, sigur Lassin Isaksen, sum er føddur í 1961 og harvið hevur tvey ár eftir á altjóða pallinum.